Álit

í

løgtingsmáli nr. 89/2023: Uppskot til løgtingslóg um Kervi+

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð 19. mars 2024 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars og 3. og 10. apríl 2024.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Fróðskaparsetur Føroya og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Undirvísingarstýrinum.

Kervi+ verður almenna talgilda lestrarfyrisitingin í Føroyum, og er hon ein liður í KT heildarætlanini fyri undirvísingarverkið, sum var liðug og handað landsstýrinum í september 2020 og samtykt í Løgtinginum í apríl 2021.

Í Kervi+ verða upplýsingar um næmingar skrásettar. Talan er til dømis um navn, p-tal, bústað, fráveru og próvtøl. Harafturat verða eisini upplýsingar um starvsfólk, bygningar og hølir skrásettar.

Uppskotið ásetir yvirskipaðu rammurnar fyri nýtslu av upplýsingunum í skipanini og heimildirnar at umsita hana, og eisini verður Kervi+ við uppskotinum viðurkent sum almenna talgilda lestrarfyrisitingarskipanin í Føroyum.

Millum annað verður ásett, at skulu persónsupplýsingar flytast millum skúlar, krevst loyvi frá tí skrásetta, men stendst ein ósemja um flyting av upplýsingum, er ein kærumøguleiki eisini ásettur. Tað kann til dømis verða, um ein næmingur er undir 18 ár, og samtykki ikki fæst frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleika at flyta upplýsingarnar um næmingin millum skúlar.

Hóast Kervi+ gerst almenna talgilda lestrarfyriskipanin, verða skrásettu upplýsingarnar ikki almennar so allir brúkarar hava atgongd til tær. Skulu upplýsingar til dømis flytast millum skúlar í samband við skúlaskifti, hendir tað ikki sjálvvirkandi. Fyrrverandi skúlin skal tá meta um, hvørt tað er neyðugt hjá móttakandi skúlanum at fáa upplýsingar. Metir fyrrverandi skúlin tað vera neyðugt, skulu tey annahvørt biðja næmingin um loyvi at lata upplýsingarnar víðari, ella foreldrini, um næmingurin er undir 18 ár.

Fróðskaparsetur Føroya hevur royndarkoyrt skipanina, og higartil eru royndirnar góðar, hóast skipanin ikki er liðugt ment.

Í eini skipan sum hesari er umráðandi, at trygdin er í hásæti. Lógin er gjørd í samráð við Dátueftirlitið, og harafturat hevur ein stýrisbólkur við umboðum fyri Undirvísingarstýrið, Gjaldstovuna, Nám og Barna- og útbúgvingarmálaráðið arbeitt við málinum. Alt fyri at tryggja, at lógin livir upp til ásetingarnar í dátuverndarlógini um vernd av persónsupplýsingum. Millum annað er viðmerkt, at øll viðgerð av persónsupplýsingum skal liva upp til § 7 í dáturverndarlógini, sum

millum annað ásetur, at persónupplýsingar bara skulu viðgerast, um tað er eitt greitt endamál við tí, og at tað skal gerast lógligt, sakligt og atgongd skal bara gevast til upplýsingar, sum eru neyðugar.

Harafturat er upplýst fyri nevndini, at ein loggur skal verða á skipanini, sum skrásetir, hvør brúkari fer inn á hvørjar upplýsingar. Tað er eisini fyri at gera skipanina so trygga sum gjørligt og at forða fyri misnýtslu.

Samanumtikið metir nevndin, at hetta er eitt gott uppskot og ein góð skipan, sum fer at verða við til at effektivisera umsitingina á økinum og vónandi hava nógv smidligari mannagongdir við sær enn higartil.

Dentur skal tó leggjast á, at allar upplýsingar, sum verða skrásettar, skulu viðgerast við størstu virðing og í samsvari við lógina um dátuvernd.

Í mun til kostnað verður mett, at tá Kervi+ er liðugt ment og verksett, verður tørvur á fígging til framhaldandi rakstur og viðlíkahald, men at tað kann fíggjast við umskipanum í verandi KT-loysnum og fyrisitingarligum bygnaði.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 17. apríl 2024

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Súsanna Bertholdsen
Liljan Weihe	Erling Eidesgaard	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	